# YRA BARA TIL



LESKILIGT

*Næmingarnir á Kokkaskúlanum í Klaksvík hava lagt nógva orku í at fáa alt at síggja so leskiligt út sum tilber. - Her er okkurt til øll, sigur Olga Hansen úr Fuglafirði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Best er sjálvandi, at eta sunnan mat frá nýggjárinum og til jóla**

## Ósunnur jólamatur

Tann tradisjonelli maturin ger seg eisini galdandi, tá tey á Vesturstovu í Fuglafirði skuldu hugna um tey eldru við eitt jólaborðhald. Tá er vist ikki tann stóri munur á matarskránni á sambýlinum og í einum vanligum føroyskum heimi.

– Og ja, jólamaturin er ógvuliga ósunnur matur. Eingin ivi um tað, slær Olga Hansen fast.

Her kann talan vera um eina meiri at kalla útlendska matskrá: Eina góða og vælgødda dunnu ella eina góða fleskasteik, sum bæði hava tað til felags, at nógv feitt er í.

Velur ein hinvegin at eta ein meiri føroyskan rætt, tá ein koyrir ræst kjøt í ovnin, er eisini talan um feitan kost í so máta.

Í øllum trimum førum er talan um rættiliga ósunnan mat.

Hóast ein í okkara tíð tosar nógv um sunnan kost, grønmeti og heilsu, hevur hetta líkasum ikki rinið við, hvørki tað verandi ættarliðið ella tað komandi. Tey ungu vilja helst eta tað sama sum tey eldru á jólum.

– Men, slær Olga brosandi fast. – Tað ger ikki so nógv, um ein bert etur ósunnan mat á jólum. Best er sjálvandi, at eta sunnan mat frá nýggjárinum og til jóla.